VIÐMERKINGAR

# Løgmaður skeyt aftur langt við síðuna av

*John Dalsgarð, Hesuferð*



Skuldsetingin um skipaðan ágang og undirgravandi virksemi ímóti tiltakinum Hesuferð er, sum so ofta í føroyskum politikki, eitt skot langt við síðuna av.

Alt ov ofta kemur fyri, at politikarar okkara trilva og fiktast í blindum. Kenna teir seg nærgingnar, eru teir skjótir at snúgva kjakinum so tað fær eitt annað innihald. Brádliga verður kjakast um okkurt heilt annað, okkurt sum helst einki hevur upp á seg. Tá frøast teir, hesir gomlu, løtu og sjálvgóðu politikarar, sum bara sita har fyri lønina, ella eru valdir av gomlum, gjarvaksnum óvana.

Tiltakið Hesuferð kom í lag eina mest fyri at bera kjakið um framtíðar støðu Føroya út um tað flokspolitiska keglið, út millum fólk, tvørtur um flokspolitisku mørkini. Hvussu hetta hevur eydnast, ber altíð til at kjakast um. Okkurt gott er gjørt, okkurt kundi verið betri.

Ongantíð í hesum arbeiði, tey tvey árini Hesuferð hevur verið virkið, hava vit mett tað sum ágang ella undirgravandi virksemi at upplýsa fólk um tær politisku rembingar, ið standa fyri framman. Tá broytingar henda í politisku skipanini á tilætlaðan og neyðugan hátt, er umráðandi at allir áhugaðir partar eru við. Og tá tað flokspolitiska lokkanetið kann tykjast mongum okkara ovboðið, hildu vit tað vera vert at royna eina tvørpolitiska upplýsingarleið í fullveldismálinum.

Spurningurin um framtíðar politisku skipan okkara er alt ov týdningarmikil til at enda sum flokspolitisk kastibløka, har flokkar og menn siga seg vilja eitt, men meina og gera okkurt heilt annað. Hetta er sera ørkymlandi og tænir ongum endamáli.

Tað er framvegis ein gáta, hví løgmaður sá seg noyddan at bakka fyri donsku stjórnini, og tók ásettu fólkaatkvøðuna av skránni.

Tað er framvegis ein gáta, hví løgmaður ikki avgreiðir málið, sum staðfestir Føroyar sum serstaka tjóð í altjóða samfelagnum, soleiðis sum tingið hevur samtykt.

Eisini er tað undranarvert, at løgmaður tvíheldur um at útgjaldsreglurnar fyri búskapargrunnin skulu vera gjørdar áðrenn eitt oyra er komið í grunnin, og tað hóast eini 6-8 ár ganga áðrenn nakað verður goldið úr grunninum. Hetta minnir mest um eina bestilta blokkering.

Eitt, sum er upp aftur meira undranarvert, er tann turkatrúgv, sum løgmaður hevur upp á, at tað ber til at samráðast við danir um føroyskt sjálvstýri/fullveldi. Hetta letur seg snøgt sagt ikki gera, og tað eru allar tær miseydnaðu samráðingarnar besta prógv um.

Hví vil løgmaður ikki sjálvur taka róður í hond, og royna at greiða sínum veljarum frá, at tað ber til at stýra Føroyum í Føroyum? Tað mátti verið torført at verið politikari og ikki hava álit á tí politikki, sum ein setir út í kortið. Hann hevur heldur ikki álit á sínum veljarum, ið tekur so ørkymlandi avgerðir.

Í ólavsøkurøðu síni nevndi løgmaður, at Føroyar vóru avskornar frá millumtjóða samvinnu, tí vit ikki eru eitt sjálvstøðugt land. Vit sleppa rætt og slætt ikki at vera limur í millumtjóða felagsskapum, sum gera samstarvsavtalur sínámillum. Tí liggja vit mitt ímillum, sum kastibløka í ongamannalandi. Eftir mínum tykki er hetta kjarnin í fullveldismálinum saman við teirri sannroynd at eitt komandi fullveldi fer at menna ábyrgdarkensluna millum føroyingar, eisini føroyskar politikarar.

Tí er tað av størsta týdningi, at fullveldistilgongdin heldur fram til rokkið er á mál. Og tí er umráðandi hjá hesi samgongu og løgmanni at finna stevið aftur. Ella endar tað við at mótparturin, sum er danska stjórnin, vinnur alt spælið. Vit hava lítlan møguleika at vinna á mál við aðrari flokkasamansetsing í landsstýrinum soleiðis sum teir ymsu flokkarnir hava givið seg til kennar í fullveldismálinum.

Tá danir siga fýra ár, so meina teir fýra ár og ikki tólv ár, sum løgmaður gongur og trýr. Hetta er ein veruleiki, sum allir sjálvstýrissinnaðir føroyingar eiga at viðurkenna. At halda nakað annað er vánaligur politikkur.

Tá løgmaður sigur fullveldi, so kunnu vit av røttum ivast í, um hann meinar fullveldi, ella um hann meinar okkurt annað. Gott hevði verið um løgmaður kundi staðið við síni orð.

# Her rætti eg tær bróðurhond

**Heðin Mortensen,**
*løgtingsmaður*



Mánadagin verður fundur í grundlógarnevndini. Ógreitt er, hvussu verður við skrivstovuni og arbeiðinum hjá nevndini. Spell var, um arbeiðið datt niðurfyri.

Vit eru í eini tíð, har fólk hava mist álitið á politikararnar, og klandur og gremjan hoyrist á tingi. Arbeiðið í grundlógarnevndini kann við góðum vilja endurreisa álitið á politisku skipanina og skapa semju og sátt í landinum.

Føroya løgmaður, Anfinn Kalsberg, sigst ynskja breiða semju um ríkisviðurskiftini. Í løgmansrøðuni vísti løgmaður á grundlógararbeiðið og metti, at har eru møguleikar fyri semju.

Í sanginum, »Hvør skuldi gamlar gøtur gloymt«, standa hesi orðini: »her rætti eg tær bróðurhond, so rætt tú tína mær«. Ynskir løgmaður breiða semju, so er tað júst hetta, ið skal til, at báðir partar rætta fram boð um brøðralag.

Løgmaður hevði ikki mær vitandi spurt seg fyri, um orðingin í røðu hansara var í lagi hjá andstøðulimunum og annars nevndini allari. Tí hoyrdu vit, at formaðurin í sambandsflokkinum segði seg vera ímóti føroyskari grundlóg.

Sjálvandi. Er týdningurin av orðinum »ovasta lógin hjá einum fullveldi«, so er sambandsflokkurin ikki við. Men, hevði løgmaður sagt »ein lóg, ið kemur í staðin fyri stýrisskipanarlógina«, so hevði helst borið til.

Øll feløg hava viðtøkur, sjálvt um tey sjálvi eru imir í øðrum feløgum. Vit kunnu saktans semjast um viðtøkurnar hjá Føroyum, herundir ásetingar um viðurskifti okkara við tann størra felagskapin, ríkisfelagskapin.

Sum varalimur í grundlógarnevndini havi eg fingið alt tilfarið hjá nevndini. Eg skilji tað uppskotið, nevndin hevur abeitt við, sum semjusøkjandi uppskot í fýra pørtum.

Fyri tað fyrsta eru ábøtur gjørdar á ásetingarnar í stýrisskipanarlógini. Fyri tað næsta eru mannarættindini orðað á føroyskum fyri fyrstu ferð.

Fyri tað triðja er ein greið støðutakan til ríkisstøðuna hjá Føroyum í dag. Og at enda ein mannagongd fyri, hvussu ein fullveldisstøka skal fara fram.

Við tí uppskotinum fáa vit betra verandi støðu, vit fáa ein felags føroyska fatan av, at Føroyar eru í sáttmálastøðu við Danmark, og vit semjast um, hvussu loysingin skal samtykkjast.

Hetta tykir mær vera ein góð semja, tí allir flokkur noyðast at slaka, men um somu tí eru allir flokkar saman um tað, ið best er fyri Føroyar.

Trupulleikin er bara, at løgmaður í røðu sín samtundis boðar frá einsíðugum yvirtøkum, einsíðugum skerjingum av blokkinum. Varaløgmaður boðar frá einum heitum politiskum heysti og sigur tað onki nytta at samskifta við danir. Slíkt ber ikki til, skulu vit finna semju.

Flestu viðmerkingar frá andstøðuni til samgonguátøk eru vanliga negativar. Men her er ein sera positiv viðmerking. Eg eri samdur við løgmanni í, at grundlógarnevndin kann vísa á breiða semju um stjórnarviðurskifti okkara. Tað krevur bara, at nevndin fær frið at arbeiða eina tíð, og at andstøðuumboðini sleppa at kunngerða, nær semjan er borðbar.

So, Føroya løgmaður, her rætti eg tær bróðurhond, so rætt tú tína mær!

Listastevnan:

# Føroyskir sangarar sleppa at royna seg í »Master-class«

LISTASTEVNA

Tað verða ikki einans áhoyrararnir, sum fáa gleði av framførsluni av operuni Madame Butterfly. Í sambandi við, at »The Irish Opera« vitjar Føroyar við framførslu av Puccini-operuni á Listastevnu Føroya, fáa eisini føroyskir sangarar ágóða av útlendsku sangvitjanini.

Stjórin í írsku operuni, Michael Hunt, fer nevnliga at geva seks føroyskum sangarum undirvísing í operasangi. Hetta er ein sokallaður master-class, har hann fer at leggja sangarunum lag á, og at tosa við teir um tulkingar og sangteknikk.

Teir seks føroyingarnir hava hvør valt sær tvær opera-ariur, sum teir fara at framføra fyri Michael Hunt. Talan er um ariur eftir Mozart, Puccini, Verdi og øðrum. Stamen Stanchev fer at hava klaverfylgispælið, tá sungið verður.

Tað er »The Irish Opera«, sum hevur bjóðað seg fram at halda hetta skeiðið fyri áhugaðum føroyskum sangarum. Og líkt er sostatt til, at áhugin uttanlanda fyri føroysku røddunum er vaksandi. Íslendska Operain hevur játtað at útvega lærarar til nýstovnaða føroyska sangskúlan. So helst verða enn fleiri útlendskir operasangarar at hoyra í Føroyum í heyst.

Undirvísingin hjá stjóranum í »The Irish Opera« verður leygardagin og sunnudagin í Norðurlandahúsinum. Sunnudagin verður byrjað kl. 14.30. Tá hevur almenningurin atgongd, so til ber at fáa íbástur og annars hoyra føroysku røddirnar royna seg í operasangi.



# Amerada Hess ger klárt



*Í eina góða viku hava vitjandi í SMS havt møguleika at síggja modell av stóra boripallinum Sovereign Explorer, sum Transocean eigur. Modellið verður at síggja til leygardagin.*
*Mynd Jens K Vang*

OLJULEITING
*Jan Müller*

Nú tað gongur móti endanum á teimum báðum fyrstu boringunum á føroyska landgrunninum er triðja oljusamtakið við Amerada Hess á odda farið at gera klárt til sína fyrstu boring. Hesar seinastu dagarnar er nógv útgerð so sum borirør, tilfar av ymsum slag o.a. komið til Runavíkar, har tað verður at liggja í nakrar vikur.

Hjá Amerada Hess bíða teir eisini við spenningi eftir úrslitinum av teimum báðum boringunum hjá Statoil og BP. Fyri Hess hevur tað alstóran týdning, at Statoil heldur tíðarætlanina, tí tað skal brúka sama boripallin, Sovereign Explorer. Miðjað verður móti at kunna byrja boringina tíðliga í september. Hetta er eisini avgerandi, tí samtakið skal bora í einar tveir mánaðir ella so og helst skulu vit ikki koma ov langt út á veturin, áðrenn boringin er liðug.

Tað er eingin loyna, at tað kann koma The Faroes Partnership-samtakinum væl við, at tvær boringar hava verið, áðrenn tað fer at bora. Tað er nevniliga ikki óvanligt, at oljufeløg lata upplýsingar til onnur, sum fara at bora í sama øki. Tvs. at Amerada Hess kann fáa týðandi upplýsingar frá Statoil og BP um teirra brunnar og hvussu løgini síggja út teir 4-5 kilometrarnar niður í undirgrundina. Antin olja verður funnin ella ikki, so kunnu slíkir parametrar hava týdning fyri eina nýggja boring.

Sosialurin skilur annars, at tað gongur eftir ætlan hjá bæði Statoil og BP. BP vil helst røkka endaliga máli sínum einaferð í næstu viku. Statoil vil røkka mál síni í næstu og í aðru viku gongst eftir ætlan. Framvegis verður einki upplýst úrslitið av boringunum. Fylgja vit tí sannlíkinum fyri at finna olju og hesi framvegis halda, so peikar fingurin niðureftir, tí seinlíkini fyri ikki at finna nakað eru størri enn fyri at gera fund.

# Royking kostar barnalív

**Ein kanning á Århus Universitetshospital staðfestir, royking millum barnakonur kostar lív**

KANNING
*Eyðun Klakstein*

Lótu allar barnakonur í Danmark verða við at roykja, so hevði fjórðahvørt deyðfødda barn komið til verðina á lívi, og fimta hvørt deyðsfall millum smábørn undir eitt ár hevði ikki komið fyri.

Tað vísir ein nýggja kanning, sum er gjørd á Universitetshospitalinum í Århus, og sum er almannakunngjørd í American Journal og Epidemiology.

Granskararnir í Århus hava kanna 25.000 barnakonur, og teir hava fyri fyrstu ferð nakrantíð staðfest illgrunan um, at royking kostar lív. Í Danmark er talan um eini 150 barnalív um árið.

– Hetta er ein ómetaliga týdningarmikil boðskapur. Summar mammur siga, at børnini verða lættari, um tær roykja, og tað gevur eina lættari føðing. Men tað vísir seg tíverrri, at royking er lívsvandamikil, sigur læknin Kirsten Wisborg, leiðari fyri granskingararbeiðið.

Granskararnir hava samanlíknað tøl fyri roykjandi og ikki-roykaandi kvinnur, sum hava verið við barn, frá 1989 til 1996, og tað eru hesi tøl, sum granskingin byggir á.


